# Ólóglig sigling um firðirnar

**Í sambandi við verkbannið eru tað nógvir bátar, sum flyta fólk um bæði Leirvíksfjørð og Suðuroyarfjørð, hóast teir ikki hava loyvi til hetta. Skipaeftirlitið hevur steðgað fleiri av bátunum, men ógjørligt er at steðga øllum**

FLUTNINGUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Silja Star er ein av bátunum, sum hevur siglt við ferðafólki um firðirnar hesar seinastu dagarnar. Báturin hjá Palla Lamhauge í Vestmanna er liðugt umvældur eftir óhappið fyrr í ár, og Skipaeftirlitið hevur útvegað bátinum neyðugu loyvini aftur.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Síðani verkbannið bleiv lýst hósdagin, hava strandfaraskipini ligið svínabundin við bryggjurnar, og hesum hava fleiri eigarar av smærri og størri bátum gjørt sær dælt av. Teir hava fyri eina ávísa upphædd, ið er væl hægri enn tann, ið tú vanliga rindar umborð á strandfaraskipunum, flutt fólk um eitt nú Leirvíksfjørð og Suðuroyarfjørð. Skipaeftirlitið hevur roynt at havt eftirlit við hesum bátum, og fleiri teirra eru steðgaðir, tí teir ikki hava havt neyðugu loyvini, sigur stjórin á Skipaeftirlitinum.

### Ongin tikin um Suðuroyarfjørð

Óla Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum, sigur, at tað fyrst og fremst er á farleiðini um Leirvíksfjørð, at trupullein við óllógligari sigling er stórur.

- Vit hava enn ikki tikið nakran bát, sum hevur siglt ólógligani um Suðuroyarfjørð, men vit hava tikið fleiri um Leirvíksfjørð. Hetta eru bátar, sum ikki lúka neyðugu krøvini, og sum ikki hava pappír upp á nakað sum helst. Tað er enntá komið fyri, at vit hava steðgað onkrum báti, ið als onga bjargingarútgerð hevur havt umborð, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Stjórin á Skipaeftirlitinum samanber ólógligu siglingina við, at bilar, sum ikki eru sýnaðir og tískil ikki hava nakað nummarspjaldur, fluttu fólk aftur og fram millum bygdir.

- Eingin veit hvørjum standi bátarnir eru í, tí teir ikki eru sýnaðir. Vit noyðast tó at staðfesta, at tað er trupult at steðga hesum, tí bátarnir eru nógvir, og vit hava avmarkaða orku, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

### Ferðast undir egnari ábyrgd

At fólk velja at ferðast við smábátum, ið ikki hava neyðugu loyvini, er vandamikið, men ferðafólkini ferðast undir egnari ábyrgd, og eingin trygging verjir ferðafólkini, um báturin ikki hevur neyðugu loyvini. Óla Hans Hammer Olsen sigur, at tað er ikki uttan orsøk, at krøvini eru sett, og at tað heldur ikki er bert her í Føroyum, at hesi krøv eru galdandi.

Verkbannið rakar eisini Skipaeftirlitið, tí av teimum ellivu starvsfólkunum á stovninum eru hálvtfimta í arbeiðssteðgi, og tað rakar partvís eisini eftirlitsfólkini, greiðir Óla Hans Hammer Olsen frá.

Nakað av slatri hevur gingið um loyvini hjá teimum, ið hava flutt fólk um Suðuroyarfjørð. Tað hevur eitt nú ljóðað, at sluppirnar báðar, Johanna og Norðlýsið, hava flutt nógv fólk aftur og fram. Her vísir Óla Hans Hammer Olsen á, at Norðlýsið hevur loyvi til at sigla við okkurt um fimti ferðafólkum, meðan Johanna bert hevur loyvi til at hava 12 ferðafólk við umborð. Sosialurin er tó vitandi um, at Johanna hevur siglt við væl fleiri enn 12 ferðafólkum hesar dagarnar.

Tað hevur eisini ljóðað, at Silja Star, sum nú er liðugt umvæld og hevur siglt um Suðuroyarfjørð í vikuskiftinum, ikki hevur fingið siglingarloyvi aftur, men tað avsannar stjórin í Skipaeftirlitinum.

- Tá ið Silja Star var liðugt umvæld, vóru fólk og sýnaðu bátin í Noreg, so har er alt í lagi, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

# "Barbara" í uppskoti til Emmy-virðisløn

**Anneke von der Lippe, sum spældi høvuðsleiklutin í filminum um Barbaru, er innstillað til eina Emmy-virðisløn, ið eru fremstu virðislønir, ið verða latnar innan sjónvarpsframleiðslu**

VIRÐISLØNIR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Her á landi hava vit annars ikki hoyrt so nógv til norsku Anneke von der Lippe, síðani hon spældi leiklutin sum Barbara í filminum av sama navni. Men nú er norska sjónleikarakvinnan so komin við í allarfremstu røð innan sjónvarpsframleiðslu.

### Fyrsta norska umboðanin

Í Noreg gera tey nógv burtur úr, at Anneke von der Lippe er innstillað til virðislønina, tí tað er fyrstu ferð í søguni, at ein norskur sjónleikari er í uppskoti til heiðurin.

Emmy-virðislønirnar eru sum áðurnevnt tær fremstu innan fyri sjónvarpsframleiðslu, og tær eru býttar upp í tveir bólkar.

Tá ið Anneke von der Lippe tann 21. november fær at vita, um hon hevur vunnið virðislønina, eru tað tær altjóða Emmy-virðislønirnar, ið verða latnar. Tað vil siga, at tá eru tað sjónvarpsframsleiðslur úr øllum heiminum, ið kapping stendur millum.

Emmy-virðislønir verða eisini latnar bert fyri amerikanskar framleiðslur, og hesar virðislønirnar vóru latnar fyri kortum.

### Spælir heilsumálaráðharri

Annika von der Lippe er í uppskoti til Emmy-virðislønina fyri sín leiklut í norsku sendirøðini "Ved kongens bord". Í sendirøðini spælir sjónleikarakvinnan leiklutin sum norskur heilsumálaráðharri.

Tríggjar aðrar sjónleikarakvinnur eru í uppskoti til heiðurin sum besta sjónleikarakvinna í eini spenningsrøð. Tær eru He Lin úr Kina, Carolina Oliveira úr Brasil og Catherine Tate úr Bretlandi.

Sum áðurnevnt verður tað avdúkað tann 21. november, hvør ið fær heiðurin, tá ið eitt stórt tiltak verður í New York, har millum annað Oprah Winfrey og Hillary Clinton fara at taka lut.



*Anneke von der Lippe, sum føroyingar kenna aftur frá leiklutinum sum Barbara, er nú í uppskoti at fáa eina Emmy-virðisløn sum fyrsti norski sjónleikarin nakrantíð.*
*savnsmynd*